ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
Sosialurin 28. oktober 2009

# Oddabrak í Runavík




Oddaliðini í Sunset-kappingini, sum hittast í Runavík í kvøld, vóru eisini oddalið síðsta kappingarár
Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

**Í kvøld klokkan 19 bresta Tjaldur og Stjørnan saman í sonnum oddabraki í Runavík. Hetta eru tey bæði liðini, sum eru komin best frá byrjan í kappingini í vetur, umframt at tað vóru hesi bæði, sum síðsta kappingarár spældu FM-finalurnar**




Hilmar Jan Hansen

Hóast talan bert er um fjórða umfar í Sunset-kappingini, er talan samstundis um fyrsta veruliga oddadystin hjá kvinnunum í vetur, nú Tjaldur í kvøld klokkan 19 tekur ímóti Stjørnuni í ítróttarhøllini í Runavík.

Undan dystinum hava liðini spælt tríggjar dystir í part, og sigast má, at tey bæði hava fingið eina flúgvandi byrjan. Tjaldur hevur vunnið sínar dystir við 12 málum í miðal og Stjørnan hevur í miðal vunnið sínar dystir við 14 málum, so talan verður um eina veruliga styrkiroynd.

Tað vóru eisini Tjaldur og Stjørnan, sum síðsta kappingarár endaðu á teimum báðum fremstu plássunum á stigatalvuni og tí spældu FM-finalurnar, har tað eydnaðist Tjaldri – enntá sum uppflytari – at vinna tvær tær fyrstu og gerast føroyameistari fyri fyrstu ferð.

Óivað er tað nakað, Stjørnan ætlar at gera nakað við í ár, so lítið man vera at ivast í, at klaksvíkskvinnur eru sera uppsettar, nú tær í kvøld koma út á Skálafjørðin, har eitt minst líka so uppsett Tjaldurslið tekur ímóti teimum, tí upprunaliga søgdu tey í Tjaldri, at tað var ikki fyrr enn í vetur, at ætlanin var at taka meistaraheitið.

Umframt Tjaldur og Stjørnuna, hevur Neistin eisini vunnið tríggjar ferðir, so nógv bendir á, at tað verða hesi trý, ið fyrst og fremst koma at kappast um kvinnugullið í vetur. Vinnarin í Runavík í kvøld fer tvey stig fram um hini og hevur so vunnið sær fyrsta fyrimunin í oddastríðnum.

**Sunset-kappingin**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **1** | Stjørnan | 3 | 3-0-0 | 98-56 | +42 | 6 |
| **2** | Tjaldur | 3 | 3-0-0 | 106-70 | +36 | 6 |
| **3** | Neistin | 4 | 3-0-1 | 109-92 | +17 | 6 |
| **4** | VÍF | 4 | 1-0-3 | 91-124 | ÷33 | 2 |
| **5** | VB | 3 | 0-0-3 | 58-83 | ÷25 | 0 |
| **6** | StÍF | 3 | 0-0-3 | 60-97 | ÷37 | 0 |

# Flogbóltur í Sandoynni

**Stig er tikið til regluliga flogbóltsvenjing í Sandoynni, har 18 børn úr allari oynni vóru við til fyrstu venjingina. – Her er ikki so nógv hjá børnum at fara til um veturin, so vónandi vilja fleiri teirra spæla flogbólt, sigur ein av venjarunum, Sigrid Petersen í Skálavík**




Hilmar Jan Hansen

Síðsta mikukvøld var fyrsta venjingarkvøldið í Meginskúlanum, og har møttu 18 børn úr allari oynni, og so at siga allar bygdirnar vóru eisini umboðaðar. Børnini verða vand eftir »Kids Volley«-fyrimyndini, sum fevnir um børn úr fjórða og fimta flokki, og tað eru Liljan Hentze á Sandi og Sigrid Petersen í Skálavík, ið taka sær av venjingini.

– Her er ikki so nógv hjá børnum at fara til um veturin, so vónandi vilja fleiri teirra spæla flogbólt. Av øðrum er barnadansur mánakvøld, og so hava eisini skótar verið, men eingin ítróttur hevur verið fyri børnini, sigur Sigrid, ið sigur vantandi ítróttartilboðini í Sandoynni um veturin hava gjørt, at fleiri børn um veturin ferðast úr oynni til Havnar at venja og kappast í ítrótti.

– Øll foreldur eru helst ikki so fegin um at senda børnini við Teistanum av oynni á vetrartíð, og skal eg siga fyri meg, so vil eg fegin brúka eitt sindur av tíð upp á flogbóltsvenjingarnar, kunnu tær gera, at børnini verða verandi í oynni.

Flogbóltsvenjingin er partur av virkseminum hjá B71, sum sostatt hevur fingið eina ítróttargrein aftrat, og bæði Liljan og Sigrid kenna til flogbóltin frá tíð síni uttan fyri Sandoynna. Liljan frá Læraraskúlanum og Sigrid frá Fleyr og eisini onkrum felag í Århus, tá hon búði har.

– Børnini lótu øgiliga væl at fyrsta kvøldinum og vóru spent at koma aftur. Vit vóna, at hetta fer at menna seg, men í fyrsta umfari taka vit henda veturin. Longu nú hava vit teknað trý lið til Fleyr-kappingina, sum verður hálvan november, og kanska tað eisini kann skunda undir flogbóltn í oynni, sigur Sigrid Petersen.



Farið er nú undir regluliga flogbóltsvenjing í Sandoynni. Í fyrsta umfari er talan um venjing fyri børn í fjórða og fimta flokki, og longu nú hevur B71 meldað trý lið til komandi Fleyr-kappingina
Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir